# Regatta í Sydhavnini í Keypmannahavn

**Tann 29. august klokkan 14.00 verður føroyskur kappróður í Keypmannahavn**

**KAPPRÓÐUR**
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Aftur í ár skipar Róðrarfelagið Knørrur fyri kappróðuri vid Kalvebodsløbet í Sydhavnini.

Knørrur er eitt ungt felag, ið var stovnað í 2002, og heldur til í Hvidovre. Hetta er triðja ár á rað, at Knørrur skipar fyri egnu regatta í Keypmannahavn.

Umstøðurnar at hyggja at róðrinum við Kalvebodsløbet eru sera góðar. Tað er ókeypis, og øll eru hjartaliga vælkomin.

Áskoðarirnir kunnu hoyra tónleik og keypa øl, sodavatn, tvíflísar, kaffi og køkur. Lutaseðlar verða seldir. Ikki er møguligt at keypa vid dankorti.

Tiltakið var upprunaliga sett í verk fyri at menna um føroyska kappróðurin í Danmark. Tað kom soleiðis í lag, at tey fýra feløgini, sum vanliga luttaka í føroyskum kappróðuri í Danmark, gjørdu av at birta meira lív í róðurin. Áhugin var fallandi, og tað var greitt, at okkurt mátti gerast. Tískil var ein samstarvsbólkur settur, ið hevði til endamáls at skapa betur rammur fyri føroyska róðurinum í Danmark. Samstarvsbólkurin gjørdi millum annað av, at tað skuldu verða fleiri høvi at rógva kapp. Tískil skullu øll tey føroysku róðrarfeløgini standa fyri hvør sínari regatta á hvørjum ári, eins og ein rimmar gallaveitsla verður hildin, tá kappingarárið er liðugt í september.

Tann 12. september skipar Føroyskt Felag á Vestursælandi fyri kappróðuri í Sorø. Hetta er seinasti róðurin í Danmark í ár og verða vinnarirnir av samlaðu Danmarkskappingini funnir tá.

3. oktober verður róðrargalla í Føroyahúsinum.




**Skrá fyri dagin:**

| | |
|---|---|
| 13:30 | Vælkomin v/ formanni í Knørrur, Birgit Christensen |
| 14:00 | Kappróður, Heini Davidsen varpar út |
| 17:00 | Heðursmerki verða handað |
| 19:00 | Veitsla við mati og tónleiki í Føroyahúsinum, Vesterbrogade 17 A. Øll eru vælkomin |
| 23:00 | Lutaseðlar verða trektir |

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av vestri, seinnapartin upp í stívt andøvsgul av útnyrðingi. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi, seinnapartin upp í hvassan vind. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av vestri, seinnapartin minni vindur. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi, týsdagin av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 9 og 13 stig.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 10 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 16 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 16 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 25 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 20 |
| Oslo | - |
| Stokkhólm | 24 |
| Keypmannah. | 24 |
| Helsinki | 19 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 24 |
| Warzawa | 22 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 27 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 34 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 30 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 27 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 30 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 25 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 25 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 19 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 997 hPa. við Hetland fer norðureftir og dýpist.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið í landnyrðing úr Føroyum fer spakuliga vestureftir og dýpist framvegis. Lágtrýstið yvir Skotlandi fer spakuliga í landnyrðing og dýpist.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 23/08 kl. 06⁰⁰ – 24/08 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,5°
Minsti hiti máldur í august: +0,4° -
Mesti hiti máldur í august: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 23/08 kl. 06⁰⁰ – 24/08 06⁰⁰.
Avfallið higartil í august: 97 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 19. august | Mánin næstur jørðini |
| 27. august | Fyrra kvarter |
| 31. august | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 27.aug | 00:22 | 13:01 | - | 12:01 | - | 12:16 | 02:22 | 15:01 | 03:22 | 16:01 | 11:16 | 23:55 | 10:16 | 22:55 | 00:37 | 13:16 | 01:37 | 14:16 | 00:07 | 12:46 | 01:22 | 14:01 |
| 28.aug | 01:40 | 14:18 | 00:40 | 13:18 | 00:55 | 13:33 | 03:40 | 16:18 | 04:40 | 17:18 | - | 12:33 | 11:33 | - | 01:55 | 14:33 | 02:55 | 15:33 | 01:25 | 14:03 | 02:40 | 15:18 |
| 29.aug | 02:57 | 15:22 | 01:57 | 14:22 | 02:12 | 14:37 | 04:57 | 17:22 | 05:57 | 18:22 | 01:12 | 13:37 | 00:12 | 12:37 | 03:12 | 15:37 | 04:12 | 16:37 | 02:42 | 15:07 | 03:57 | 16:22 |
| 30.aug | 03:47 | 16:11 | 02:47 | 15:11 | 03:02 | 15:26 | 05:47 | 18:11 | 06:47 | 19:11 | 02:02 | 14:26 | 01:02 | 13:26 | 04:02 | 16:26 | 05:02 | 17:26 | 03:32 | 15:56 | 04:47 | 17:11 |
| 31.aug | 04:36 | 16:59 | 03:36 | 15:59 | 03:51 | 16:14 | 06:36 | 18:59 | 07:36 | 19:59 | 02:51 | 15:14 | 01:51 | 14:14 | 04:51 | 17:14 | 05:51 | 18:14 | 04:21 | 16:44 | 05:36 | 17:59 |